# Norðurlendsk ráðstevna á Selatrað

*Um vikuskiftið høvdu norðurlendsku ungdómsráðini ráðstevnu á Selatrað, har Føroya Ungdómsráð var vertur*



EDVARD JOENSEN

Norðurlendsku ungdómsráðini hava havt ráðstevnu á Selatrað, har høvuðsevnið var Útnorðursamstarv.

Ráðstevnan, sum nú varð hildin á Selatrað, var onnur av tveimum árligum ráðstevnum, sum hildnar verða á skift í Norðurlondum. Hesaferð varð avgjørt, at hon skuldi vera í Føroyum, og vertirnir valdu so at halda hana í Skótadeplinum á Selatrað. Norðurlendska Ráðharraráðið rindar hesar ráðstevnurnar.

Formenninir og aðalskrivararnir í teimum norðurlendsku ungdómsráðunum luttóku á stevnuni. Tó vóru álendingar ikki við, sigur Kári Olsen, sum er aðalskrivari hjá Føroya Ungdómsráð.

Hann sigur, at sagt varð frá teimum royndum av ungdómsarbeiðinum, hvørt landið sær hevði at vísa á.

Kári Olsen sigur, at tey stóru Norðurlondini líkasum venda sær meira suður eftir í teirra altjóða arbeiði. Tey hava meira samband við Europa, tað vil siga ES.

Hendan møguleikan vildi Føroya Ungdómsráð eisini fegið havt, men sum er, ber tað illa til. Vit hava ongan sáttmála við ES sum ger, at vit kunnu luttaka á jøvnum førti við hini londini í slíkum samstarvi.

Hini Norðurlondini hava sáttmálar, sum gera, at millumtjóða samstarv tann vegin verður fíggjað av ES, meðan føroyingar sjálvir mugu gjalda alt, skulu vit vera við í slíkum.

Kári Olsen sigur, at hann hevur frætt frá Undirvísingar- og Mentamálastýrinum, at ætlanir eru frammi um at royna at fáa eins slíkan sáttmála í lag.

Norðurlendsku Ungdómssambondini luttaka dúgliga í tí politiska arbeiðinum úti í heimi. Eitt nú hava tey verið serliga virkin í arbeiðinum við demokratiseringini av gomlu kommunistalondunum eystanfyri.

Eisini hava serliga finnar verið sera áhugaðir í at fáa sonevnda »Barentsøkið« við í samstarvið. Teir hava arbeitt dúgliga við at hjálpa teimum har uppi í gongd við altjóða ungdómsarbeiði.

Føroya Ungdómsráð metir, at um føroyingar høvdu havt somu møguleikar sum hini Norðanlondini til at luttikið í altjóða arbeiðinum, hevði tað styrkt føroyska ungdómin munandi og gjørt hann betri føran fyri at viðgjørt fleiri altjóða mál, sigur Kári Olsen, aðalskrivari í Føroya Ungdómsráð.

*Ráðstevnan varð hildin á Selatrað*

# Hava fingið 126 milliónir meiri í kassan

*Føroysk fiskiskip hava avreitt fyri væl meiri í Føroyum átta teir fyrstu mánaðirnar í ár, enn tey gjørdu í fjør*



*Higartil í ár er væl meiri fiskur avreiddur í Føroyum enn tað var um somu tíð í fjør. Og í ár er trúligt, at føroysk skip fara at avreiða fyri meiri enn eina milliard í Føroyum*

ÁKI BERTHOLDSEN

Enn gongur tað framá hjá føroyska fiskiflotanum.

Tey nýggjastu yvirlitini yvir fiskiskap og fiskaprísir vísir, at átta teir fyrstu mánaðirnar í ár avreiddu føroysk fiskiskip munandi meiri enn tey gjørdu í sama tíðarsskeiðið í fjør.

Tølini, sum tað her er talan um, er tað, sum skipini hava avreitt til føroyskar fiskakeyparar.

Tølini vísa, at átta teir fyrstu mánaðirnar í ár avreiddu føroysk skip fisk fyri 746 milliónir til føroyskar fiskakeyparar.

Sama tíðarskeiðið í fjør var avreiðingarvirðið 620 milliónir.

Sostatt er avreiðingarvirðið átta teir fyrstu mánaðirnar í ár 20% hægri enn tað var í sama tíðarskeiði í fjør.

Men tølini vísa eisini, at hesi seinastu árini er avreiðingarvirðið meiri enn tvífaldað.

Í 1994 avreiddu føroysk skip fisk fyri 461 milliónir til føroyskar fiskakeyparar.

Síðani er tað hækkað hvørt ár og í fjør var tað komið upp á 938 milliónir.

Men í august í át er avreiðingarvirðið, sum nevnt, 126 milliónir hægri, enn tað var um somu í fjør, so útlit eru til, at tað fer upp um milliardina í ár.

### Størri nøgd- hægri prís

Orsøkin til, at avreiðingarvirðið er so nógv hækkað átta teir fyrstu mánaðirnar í ár, afturímóti í fjør er bæði, at skipini hava fiskað væl meiri í ár. Men harafturat eru prísirnir eisini blivnir eitt vet betri í ár, enn teir vóru í fjør.

Átta teir fyrstu mánaðirnar í fjør avreiddu føroysk skip 65.698 tons til føroyskar fiskakeyparar.

Sama tíðarskeið í ár hava tey avreitt 7% meiri, ella tilsamans 70.040 tons.

Sostatt hava vit átta teir fyrstu mánaðirnar í ár longu avreitt næstan líka nógv til føroyskar fiskakeyparar, sum alt árið í 1994, tí tá var talan um 71.558 tons.

Samstundis eru avreiðingarprísirnir sum heild eitt vet hægri í ár, enn teir vóru í fjør.

Toskurin, sum mest verður fiskað av, er tann ímillum 2-4 kilo, og í september í fjør var prísurin á honum 16,30 krónur fyri kilo í miðal, men í august í ár var hann kvinkaður upp á 16,90 krónur.

Men tað verður eisini fiskað nóv av toski, í næstu støddini, tað er toski ímillum 4-7 kilo. Og eisini á tí toskinum er prísurin hægri í ár, tí í september í fjør var hann 17,49 krónur fyri kilo í miðal, men í august í ár var hann komin upp á 20,26 krónur fyri kilo.

Somuleiðis er prísurin á hýsu, sum tað eisini verður fiskað nógv av, hækkaður nokk so fitt hetta síðsta árið.

Tann størra hýsan er hækkað úr 12,34 krónur fyri kilo í miðal í september í fjør, upp í 15,65 krónur í august í ár. Tann minna hýsan er er hækkað úr 11,59 krónum fyri kilo, upp í 14,46 krónur.

Hinvegin er upsaprísurin, sum mest verður fiskað av, lækkaður nøkur oyru fyri kilo.

Besta prísin yvirhøvur, hevði tann stóru kalvin, tí á honum var miðalprísurin í august í ár 64,23 krónur fyri kilo.



# Tíðin komin at lata læknan pirka

*Um heystið verða vit vanliga rakt av influensu og øðrum virus-sjúkum, og tí er gott at vera vakin og lata læknan seta nálina í beinanvegin, áðrenn man verður seingjarliggjandi*



*Tíðin er komin at seta nálina í. Influensan fer óivað at raka landið nakað skjótt, og betri er at vera fyrivarin enn eftirsnarin*

STEFAN Í SKORINI

Næstu tveir mánaðirnir skulu fólk vera á varðhaldi. Tað er nevnliga nú, at influensa og aðrar virus-sjúkur herja landið.

– Hetta er tíðin, tá influensurnar raka okkum, og tíðin er eisini komin til at spoyta seg ímóti teimum influensunum, sum kunnu koma, sigur Sølvi Winther Olsen, kommunulækni í Havn.

– Tað, sum vit hava í løtuni, eru tær vanligu virussjúkurnar, ið raka luftveg, nøs og lungu, har vøddapína fylgir við. Tær raka ein sjúkling í 2 dagar upp til eina viku, og tær eru hvørt heyst, sigur Sølvi Winther Olsen.

Influensan er ein harðlig sjúka og tiltikin fyri at verða skrøpp, sigur Sølvi. Tey veruliga ógvusligu Hong Kong-virusini, sum kunnu vera vandamikil, hava vit tó ikki sæð í Føroyum í nógv ár, tíbetur, men linari influensur raka okkum so at siga hvørt ár. Fyri at fyribyrgja at vit verða rakt av teimum meira harðligu influensunum, er týdningarmikið at vit lata okkum pirka.

– Eg havi ikki lagt til merkis, at nøkur influensa er á veg, men so skjótt tey í grannalondunum fara at hosta og fáa fepur, gongur ikki long tíð, áðrenn vit eisini eru rakt, sigur Sølvi.

Kommunulæknarnir eru farnir í gongd við at vaksinera fólk, sum ynskja tað, men Sølvi undrast á, at tað eru so fá, sum taka av hesum møguleika. Tað er óheppið, tí hetta er tíðin at fáa tað gjørt, og tað kann skjótt gerast ov seint. Tá so nógv eru vorðin sjúk, koma øll rennandi í senn, ístaðin fyri at fleiri fáa tað gjørt beinanvegin.

Tey, sum eru eldri enn 65 ár, ella onnur, ið eru sjúk, sleppa fyrst framat, tí tey eru ringast fyri, um tey verða rakt.

Um ein verður raktur av influensu, eru bestu ráðini at halda seg innandura og ikki smitta onnur. Vanligt er, at man verður raktur av høgum fepri. Tað kunnu læknarnir sum so ikki gera nakað við, og penisillin hjálpir ikki. Ráðini frá Sølva eru eisini, at sjúklingar fáa sær magnyl og panodil, meðan teir hava influensu.

Tá talan er um børn, skulu foreldur verða á varðhaldi, tí tey fáa ofta útslett, og vandi kann vera fyri meningitis. Um børn fáa reyðar blóðblettir á húðina, er best at seta seg í samband við lækna.

# Merkja vaksandi mentanarvirksemi

*Fyri einum góðum mánaði síðani hevði Dansk-Færøsk Kulturfond fund, har umsóknirnar, sum eru komnar inn í ár, vórðu viðgjørdar. 35 hava fingið játtað pening til mentanarvirksemi í Føroyum og Danmark*



*Ríkisumboðið hevur fastan sess í Dansk-Færøsk Kulturfond. Í løtuni er Vibeke Larsen ríkisumboð, og hevur hon tí fastan sess*

STEFAN Í SKORINI

Føroysku limirnir í nevndini eru Dánjal Petur Højgaard og Eyðun Andreassen, sum báðir eru valdir av landsstýrinum. Teir eru gamlir í garði og hava sitið í nevndini í meira enn tíggju ár. Dánjal Petur Højgaard undirvísir á Studentaskúlanum og HF-skeiðnum í Eysturoynni, meðan Eyðun Andreassen arbeiðir á Føroyamálsdeildini.

Ríkisumboðið er hinvegin fastur limur, sum ikki kann skiftast út. Í løtuni er tað Vibeke Larsen, ið røkir starvið sum Ríkisumboð, og er hon tí fastur limur í nevndini.

Formaður í nevndini er Nils Bernstein, sum er deildarstjóri í forsætisráðstovuni í Danmark. Tann, ið er deildarstjóri har, er altíð formaður í nevdnini. Hin danski limurin er Annette Skydsgaard, sum arbeiðir innan tónleik í Danmark. Harafturat eru eisini tveir skrivarar.

### 50 umsóknir um árið

Nevndin kemur saman til fundar einaferð um árið, og fundurin verður hildin annaðhvørt ár í Danmark og annaðhvørt í Føroyum. Tá nevndin hevur fund, verða allar umsóknirnar, sum eru komnar inn gjøgnum árið, viðgjørdar, og avgerð verður tikin um, hvør skal hava pening til sítt mentanarvirksemi.

Fyrr var tað soleiðis, at umsóknirnar vórðu viðgjørdar, so hvørt tær komu inn, men nú er alt savnað í einum, og ein tíðarfreist er sett fyri móttøku av umsóknum.

Tað eru ongar mørk fyri, hvat slag av mentanarvirksemi talan kann vera um. Allar listagreinar eru umboðaðar. Tann einasta treytin er, at innihaldið skal vera okkurt, sum hevur við danskt/føroyskt samstarv at gera, tí hetta er ein bæði føroyskur og danskur grunnur.

Nevndin setir tó nøkur dygdarkrøv til tey, sum ætla sær at fáa penging. Ein ávís góðska skal vera í tí mentanarvirksemi, sum fær játtan, tí eitt eitt støði skal haldast.

Í ár vórðu eini 70 umsóknir sendar nevndini. Talið liggur eisini vanliga um tær 70 umsóknirnar um árið. Vanligt er, fleiri danskar umsóknir eru, men í ár eru tað fleiri føroyingar, sum hava fingið játtan. Nøkur av teimum, sum hava fingið játtan, eru føroyingar, ið búgva niðri í Danmark. Umleið helmingurin av umsóknunum fáa játtan.

Undanfarin ár hevur verið javnvág millum føroyskar og danskar umsóknir, sum hava fingið játtan.

Allar umsóknirnar verða ikki gingnar á møti, men meira enn helvtin av umsøkjarunum fáa pengin játtaðan. Í er eru tað 35 projekt, sum hava fingið pening játtaðan úr Dansk-Færøsk Kulturfond.

### Merkja vaksandi virksemi

Dánjal Petur Højgaard hevur verið nevndarlimur í eini trettan ár, so hann hevur ein góða hilling á, hvar føroyskt mentanarlív flýtur.

– Vit merkja vaksandi mentanarvirksemi í Før-oyum, sjálvt um vit bara hava ein lítlan part av hesum virksemi um hendi í grunninum, sigur Dánjal Petur.

Hann heldur tað verða løgið, at so fáir ungir føroyingar nýta møguleikan at fáa ferðastuðul úr grunninum. Hesin stuðul kann fáast, um man skal til okkurt mentanartiltak ella líknandi í Danmark. Sjálvt um grunnurin hevur lýst í bløðunum, og tað hevur verið uppsligið á skúlunum, eru umsóknirnar fáar.

Stuðulin er 5.000 krónur, men alt ov fáir føroyingar søkja, og okkurt árið hevur eingin søkt. Hetta er ein møguleiki, sum fleiri áttu at gjørt sær dælt av.

Grunnurin játtar tilsamans eini 300.000 krónur árliga, og tí verða játtanirnar smábýttar, tí heili 35 hava fingið pening í ár. Játtanirnar í ár liggja ímillum 5 og 25 túsund krónur.

Grunnurin varð settur á stovn beint eftir kríggið og hevur tí nærum hálvthundrað ár á baki. Hann varð stovnaður við bæði føroyskum og donskum innskoti, og nú verður arbeitt við rentunum av hesum pengi.

Av teimum føroysku játtanunum, sum eru gingnar á møti í ár kunnu nevnast: Álakórið til Kórfestival í Aalborg, Tórhavnar Manskór á konsertferð til Danmarkar, Kirkjukórið Ljómur á konsertferð til Danmark, Húsakórið á konsertferð til Føroyar, Summartónar, Havnarkórið til kórstevnuna Atlantsljómur, Urd Johannesen til verkætlanina »Ferðin«, Anna Klett á konsertferð til Føroyar, Kári Sverrisson til tónleikaútgávu, Edvard Nyholm Debess til tónleikaútgávu, Durita og Rúni Brattaberg tónleikaútgávu og konsertferð, Vigdis Højgaard til listaframsýning í Keypmannahavn, Rúna Hilduberg til listaframsýning, Øssur Mohr til framsýning í Maribo, Bókaforlagið Atlantis og málarin Bárður Jákupsson til bókaútgávu, Hansina Iversen til list á internetinum, Fróðskaparsetrið til málvísund, Kirsten Brix til bókaútgávu í Danmark, Teitur Árnason Dahl til dokumentarfilm og Politistafelagið til bókaútgávu.

Umframt hesar játtanir eru eisini tær donsku, og tilsamans eru játtaðar 299.000 krónur.